# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Trýst er tað einasta, sum kann fáa Iran at sleppa sínum kjarnorkuætlanum*

*(Ehud Olmert, ísraelskur forsætisráðharri).*

## ES ætlar at verja børnini ímóti fartelefonini

**Í samstarvi við veitararnar ætlar ES at forða fyri, at børn kunnu fáa fatur á pornografiskum tilfari og harðskapsspølum ígjøgnum fartelefonina**

Altsamt fleiri børn og ung hava fartelefon, og kanningar í fleiri ES-londum hava víst, at í summum londum fáa børnini fartelefon, longu tá tey eru átta ára gomul. Í flestu førum fáa børnini fartelefonina, so foreldrini kunnu vita, hvar børnini eru. Harafturímóti vilja børnini hava fartelefon, tí tey kenna tað sum eitt slag av frælsi. Men í nógvum førum keypa foreldrini fartelefonina, uttan at tey vita, hvat børnini í veruleikanum brúka hana til.

Nú hevur ES skrivað undir sáttmála við 16 av teimum størstu telefonfeløgunum í Evropa. Sambært sáttmálanum skulu feløgini fremja tiltøk, sum skulu forða fyri, at børn og ung brúka fartelefonina til at fáa fatur á pornografiskum tilfari ella spølum við harðskapi. Harumframt skulu telefonfeløgini vísa foreldrunum, hvussu tey kunnu kanna, hvussu børnini brúka fartelefonina.

Tað finnast skipanir, sum kunnu forða fyri, at børn og ung fáa óhóskandi tilfar ígjøgnum fartelefonina. Tær eru kortini ikki fullgóðar, men ES-nevndin ætlar at leggja dent á at menna tær.



*Tað var ES-kommiserurin Viviane Reading, sum kunngjørdi ætlanina hjá ES-nevndini*

## Kann fáa fleiri ár afturat í fongsli

**Russiska ákæruvaldið ætlar at stevna ríkmanninum Mikhail Khodorkovskij eina ferð afturat. Tað kann enda við 15 árum afturat aftan fyri rímarnar**



*Mikhail Khodorkovskij*

Einaferð var Mikhail Khodorkovskij ríkasti maður í Russlandi, og sum stovnari og høvuðspartaeigari í oljufelagnum Yukos var hann ein tann máttmesti maðurin í russiska fíggjarheiminum.

Seinastu trý árini hevur hann sitið í fongsli eysturi í Sibir, og gongst, sum russiska ákæruvaldið ætlar, verður hann verandi har í nógv ár afturat. Tí nú vil ákæruvaldið vera við, at hann hevur snýtt fyri einar 140 mia. krónur í skatti.

Mikhail Khodorkovskij var ein av teimum russarunum, sum gjørdust ovurríkir, eftir at Sovjetsamveldið var dottið sundur. Hann hevði stóra ávirkan, til hann bleiv dømdur níggju ára fongsul fyri svik og fíggjarundandrátt. Undir vanligum umstøðum hevði hann sloppið úr fongslinum í ár ella næsta ár eftir at hava sitið helvtina av dóminum, men tær nýggju ákærurnar gera, at hann sleppur ikki út.

Verji hansara vísir nýggju ákærunum aftur.

– Hetta er heilt burturvið. Tað ber ikki til at fjala so nógvar pengar, sigur Yuri Schmit við vesturlendskar fjølmiðlar.

Tá Mikhail Khodorkovskij bleiv dømdur níggju ára fongsul, vildu fleiri vera við, at tað var Vladimir Putin, forseti, sum vildi hava ríkmannin settan til viks, tí hann hevði ov stóra ávirkan. Norski Russlandseygleiðarin Indra Øverland ivast í hesum.

– Mong vestanfyri síggja hetta sum eitt stríð ímillum tann góða Khodorkovskij og tann ónda Putin, men tað er ikki so. Tað er ikki víst, at Khodorkovskij hevur reint mjøl í posanum, sigur Indra Øverland við Dagsavisen.

Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

REINGERÐARFÓLK

Hotel Hafnia søkir eftir reingerðarfólki, at byrja skjótast tilber.



HOTEL HAFNIA er eitt altjóða 4-stjørna hotell, við 57 kømurum, 5 fundar- og veitsluhølum, matstovu og lounge.

Hotellið er væl vitjað av handils- og ferðafólki úr øllum heiminum, og hetta er við til at seta dám á livandi umhvørvið.

Vit eru 45 fólk, ið dagliga starvast við at veita Føroya bestu tænastu til gestir okkara.

Arbeiðið fevnir um:
Vanliga reingerð av hotellinum

Starvstíðin er:
Sambært vaktarskipan í dagtímum og annaðhvørt vikuskifti.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Hotel Hafnia á telefon 31 32 33

Umsókn skal sendast til:

*Hotel Hafnia*
*Áarvegur 4 - 10*
*FO-100 Tórshavn*
*hafnia@hafnia.fo*



Hotel Hafnia
Hotellið í miðbýnum
HOTEL HAFNIA